## Kunnandi fundur um kirkjulógir á Argjum



Mikudagin verður kunnandi fundur um kirkjulógirnar í kirkjuni á Argjum. Fundurin er ein liður í kunningarferðini hjá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir.

Tað verður Bergur Berg, sum kemur at greiða frá lógaruppskotunum. Tað verður høvi at seta spurningar og gera viðmerkingar.

Fundurin er fyri kirkjuráðslimir og onnur áhugað, sigur Felagið fyri Kirkjuráðslimir.

## Ættleiðingarfelagið kunnar um ættleiðing

Danadopt heldur árliga kunningarfundin í Føroyum á Hotel Hafnia hóskvøldið 1. februar 18.30 til 21.30.

Við á fundinum vera Marianne Wung-Sung varaleiðari, Mette Garnæs socialráðgevi, umboð fyri Ættleiðingarfelagið og ein føroysk familja, sum fyri stuttum hevur verið í Kina eftir einum barni. Fundurin er ætlaður teimum, ið umhugsa ættleiðing, men øll áhugaði eru hjartaliga vælkomin.

Á fundinum verður millum annað greitt frá ættleiðingargongdini, hvaðani børnini koma og hví tey eru leysgivin til ættleiðing. Tíð verður eisini sett av til at svara spurningum frá luttakarunum. Ein neyvari skrá fyri kvøldið sæst á www. aettleiding.fo

# Skal snodda seg til tíðindi kring alt landið

**Snoddi eitur bussurin hjá Sosialinum, sum fer at vera sjónligur kring alt landið. Í bilinum er innrættað skrivstova, og bilurin hevur internetsamband, so blaðfólk og myndafólk kunnu verða fyrst við tí síðsta, líka mikið, hvar tey eru stødd í landinum**




*SNAR og SNODDI eita tveir av bilunum í "flotanum" hjá Sosialinum. Snoddi fer at veiða tíðindi kring alt landið - og við skrivstovu umborð við internetsambandið, kann Snoddi altíð verða fyrstur við tí síðsta*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FJØLMIÐLAR
*Eirikur Lindenskov*

Tað var William Heinesen, sum segði, at Havnin er heimsins nalvi. Og nú Sosialurin hevur húsast í gomlu handilshúsunum hjá Williami og ætt hansara í Vágsbotni í út við tvey ár, kunnu vit sjálvandi eisini taka orð hansara til okkara, tí vit eru sera fegin um, at tað bar okkum til at flyta blaðhúsið heim í Vágsbotn, tá handilin hjá Valdemar Lützen lat aftur í 2004.

Hóast føroysku fjølmiðlarnir kanska hava ilt við at skilja, at tað er ein verð uttan fyri Havnina, so hava vit á Sosialinum ásannað tað. Júst tí fingu vit okkum fyri nøkrum árum síðani eina ”rullandi redaktión”, sum skuldi vera sjónlig kring alt landið.

Hetta konseptið hava vit nú útbygt – og hava innrættað ein buss til endamálið. Hesin bussur fer at koyra kring alt landið – og er hann innrættaður við eini skrivstovu, so blaðfólk og myndafólk okkara heit og fjálg kunnu sita í bussinum og skriva, gera samrøður o. s. fr. Við beinleiðis intersambandið í bilinum ber til hjá myndamonnum og blaðfólki at senda tilfarið beinleiðis til Sosialin, so tíðindi fáast í blaðið beinanvegin, og soleiðis at til ber at dagføra heimasíðuna hjá Sosialinum og Portalin beinleiðis úr bilinum.

Nú landfast er úr Gásadali til Viðareiðis er tað so upplagt, at vit eru meira úti um okkum á meginøkinum allatíðina. Vit fara sjálvandi eisini at vitja sunnanfjørðs, har góðu umstøðurnar í Toyota Hi-Ace bussinum geva okkara fólkum allar møguleikar at verða fyrst við tí síðsta.

Samstundis sum Snoddi, sum bussurin eitur, verður at síggja kring alt landið, fer tann lítli bilurin, Snar, fyri tað mesta at vera sjónligur í meginøkinum.

# Kunna um fríu læraraútbúgvingina

**Spennandi, donsk læraraútbúgving bjóðar til mentunnar- og kunningarkvøld í Miðlahúsinum**

LÆRARAÚTBÚGVING
*Tíðindaskriv*

Á spennandi tiltaki í Miðlahúsinum hóskvøldið 15. februar fara umboð fyri Den Frie Lærerskole í Ollerup, teirra millum tveir føroyingar, at greiða frá útbúgvingini til frískúla-, eftirskúla- og háskúlalærara.

Í løtuni liggja ítøkiligar ætlanir frammi um bæði fríksúla og eftirskúla í Føroyum, har frálæaran er grundað á somu siðir, sum í føroyska fólkaháskúlanum. Tað er í júst hesum síðum at lærarar verða útbúnir á DFL.

Útbúgvingin mennir førleikan at arbeiða í teimum fríu siðunum á skúlum, men royndir vísa eisini at útbúgvingin oftani verður brúkt til nógvar aðrar, spennandi uppgávur á arbeiðsmarknaðinum. Serliga innan starvsfólkarøkt, coaching o.l. økir, har uppgávan er at nøra um tað menniskjaliga tilfeingið.

Tann fríalæraraútbúgvingin varar í 5 ár, harav 3. árið er í lønandi starvspraktikk á einum skúla. Flestu næmingarnir búgva á skúlanum í Ollerup, har ein sera høg social og faklig samverða er reyði tráðurin í dagliga virkinum, bæði í vanligu skúlatíðini og í frítíðini. Hvønn skúladag eta lærarar og næmingar eina høvuðsmáltíð saman á middegi, og øll hesi árini, sum skúlin hevur virkað, eru nógvir dropar av góðum hugskotum regnaðir niður í eitt hav av traditiónsríkum tiltøkum, sum sermerkja tíðina á skúlanum og gera uppihaldið til eitt ógloymandi tíðarskeið við dyggari persónligari menning.

Umframt frálæru í teimum siðbundnu lærugreinunum, bjóðar skúlin eisini ein hóp av kreativum lærugreinum innanfyri best hugsandi karmar, við góðum verkstaðarfasilitetum. Den Frie Lærerskole er nærmasti granni hjá kenda ítróttarskúlanum í Ollerup og økið, har skúlin stendur, í suðureysturpartinum á Fjóni, er ein tann vakrasta náttúruperlan í Danmark, og tað er sanniliga eisini nakað, sum skúlin í nógvar mátar ger sær dælt av.

Á skránni hóskvøldið er framløga um skúlan, tónleikur, upplestur, felagssangur og sjálvandi møguleiki at seta fram spurningar. Tað er Hanne Kirk, seminarielærari, sum saman við næmingunum Stine Dahlbæk Nielsen og Christian Kock Andersen fara at standa fyri innsløgunum saman við føroyska næminginum, Annu Tórgarð og Djóni Dalsgarð, sum er fyrv. næmingur á DFL.

Tiltakið verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni hóskvøldið 15. februar kl. 20:00.

Meiri fæst at vita um Den Frie Lærerskole á www.dfl-ollerup.dk